# Spældu fyri farti til G!

**Stórur munur er á samsýningini fyri at spæla á G!. Fyriskiparin sigur, at tað eru marknaðarkreftirnar, sum ráða, og at tað sær gott út á CV'num at hava spælt á G! Teir ungu havnarbólkarnir tóku heldur óvanlig stig til at fíggja ferðina**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Herfyri vóru stuðulskonsertir í Margarinfabrikkini í Havn. Endamálið var at savna pening inn til ferðaútreiðslur hjá nøkrum av yngru bólkunum, sum skulu spæla á G! Festivalinum.

Bólkarnir hava ikki nakra serliga fíggjarliga orku, og fáa ongan pening fyri at spæla. Tí varð skipað fyri hesum heldur serliga tiltaki.

## Sær gott út á CV'num

Sosialurin spurdi Jón Tyril, talsmann fyri G! um hví G! velur at lata bólkar spæla uttan samsýning:

– Fyrst av øllum vil eg gera vart við, at eingir bólkar spæla heilt ókeypis á G! Teir fáa vikuskiftisatgongumerki til sín sjálvs og ein gest í part. Hesi hava hvørt virði av 595 kr. Harumframt fáa tónleikararnir mat og drekka, eina T-shirt, og ikki minst góða reklamu og eksponering bæði á pallinum og í fjølmiðlum og á okkara heimasíðu.

– Men tað er rætt, at vit hava ikki ráð at gjalda samsýningar í pengum til allar bólkar. Vit halda tó, at tað er ein góður møguleiki at gera vart við seg, at spæla á G!

Tað eru fleiri fólk enn vanligt sum lurta. Tað er stuttligari og festligari enn vanligar konsertir at spæla á G!, og so sær tað gott út á CV'inum hjá bólkum, sum ætla sær fram. Tí kunnu bólkar velja at spæla á G! orsakað av øðrum fyrimunum, hóast teir ikki beinleiðis fáa pengar frá okkum.

– Tað er kanska vert at viðmerkja, at tað er stór kapping um at sleppa at spæla á G!, og ein ávís prestiga knýtt at tí. Nógvir bólkar søkja um at sleppa at spæla, men pláss er tíverri ikki fyri teimum øllum. Tað er við øðrum orðum eftirspurningur eftir bara at sleppa á skránna, uttan mun til tíð ella pall. So vit meta, at bólkarnir fáa okkurt burturúr, um ikki beinleiðis í pengum í fyrstu syftu, sigur Jón Tyril

## Flutningur

*Hví rinda tit ikki ferðakostnaðin hjá bólkunum?*

– Vit hava ikki fingið áheitan um at rinda ferðakostnaðin hjá bólkunum. Eg visti einki um trupulleikar við flutningi áðrenn konsertirnar í vikuskiftinum. Tí bleiv eg eitt sindur kløkkur, tá eg hoyrdi um hesar konsertirnar. Vanliga hava føroyskir bólkar klára ferðingina sjálvir. Men tá bólkar hava heitt á okkum, um at hjálpa til við flutningi, hava vit vanliga gjørt tað.

– Vit hava tí sett okkum í samband við onkran av bólkunum, sum vóru við á konsertini á Margarinfabrikkini og spurt, um vit kunnu hjálpa til við flutninginum, so at vit finna eina loysn. Og hesir trupulleikarnir eru als ikki so torførir at loysa, so hatta verður fiksað onkursvegna. Eingir bólkar skulu sita eftir í Havn, tí teir ikki hava fart til Gøtu.

## Plasering

Fleiri av bólkunum, sum ikki fáa pening fáa somuleiðis ringa plasering, bæði á palli og tíð, er hetta ikki at útnytta spælihugin hjá teimum ungu?

– Eg haldi ikki, at nakar bólkur á G! hevur ringa plasering. Hvørki viðvíkjandi palli ella tíð. Tað eru bara tríggir pallar, og allir hóska til hvør sítt endamál. Tað eru kend og vird nøvn á øllum pallunum og allar tíðir av degnum. Vit gera okkum eisini størsta ómak at leggja skránna so væl til rættis, sum gjørligt, soleiðis at bólkar spæla, har vit meta, at teir sjálvir og áhoyrarin fáa mest burturúr.

– Tíverri kunnu ikki allir bólkarnir spæla á Sandinum á midnátt leygarkvøld, tí allir rigga ikki til tað av ymsum orsøkum. Men vit royna, sum sagt, at plasera bólkarnar so væl sum til ber.

*Hvussu hava tit avgjørt hvør fær samsýning og hvør ikki fær?*

– Enn einaferð, allir fáa okkurt burturúr. Harnæst hava allir bólkarnir hvør sína avtalu við okkum. Tú kanst siga, at tað er ein samráðingarspurningur í hvørjum einstøkum føri. Vit hava ikki nakrar standard prísir, sum vit bjóða bólkum. Í ein vissan mun ráða marknaðarkreftirnar. Vit halda okkum tó til nøkur prinsip, sum eg haldi eru umráðandi.

– M.a. tað eg havi nevnt við at allir tónleikarar fáa ein gest við, sum eisini fær backstage-atgongd, og at tónleikararnir fáa eina máltíð og okkurt at drekka og annars so góðar og virðiligar umstøður, vit yvirhøvur kunnu bjóða, sigur Jón Tyril at enda.

# Mong tjalda á Summarfestivalinum

**Einasti gistingarmøguleikin, sum er eftir til Summarfestivalin, eru tjalding og nøkur fá pláss til húsvagnar. Umstøðurnar rundan um tjaldøkið úti í Grøv eru munandi betri í ár enn í fjør**

SUMMARFESTIVALUR
*Tíðindaskriv*



*Fólk, ið ætla at tjalda á Summarfestivalinum, kunnu kenna seg trygg, tí vaktarhald verður á økinum undir øllum festivalinum*

Øll summarhúsini í norðoyggjum, har tað er koyrandi til Klaksvíkar, eru langt síðani bíløgd í sambandi við Summarfestivalin. Somuleiðis Ból og Biti. Sostatt er tjalding einasti gistingarmøguleiki, ið eftir er, vikuskiftið 5. til 7. august.

Í fjør vóru umleið tríati tjøld á økinum úti í Grøv, og tá var lag á manni at tjalda í frálíka summarveðrinum, sum tá var. Tá vóru bert wc-ið og brúsur til teirra, ið nýttu tjalding sum gistingarmøguleika, men í ár eru umstøðurnar munandi betraðar.

Umframt wc og brúsu á økinum er eitt rúm, har fólk kunnu matgera sær sjálvum og eta inni. Har eru tvær ferðir tvær kókiplátur, køliskáp og borð, har fólk kunnu eta við – umframt allar aðrar hentleikar, ið eiga at vera í einum køki.

18 el-íbindingar til húsvagnar eru til taks, og inni á sjálvum økinum er pláss fyri umleið tríati tjøldum – alt eftir hvussu stór tey eru.

Hartil hevur Karl Heri Joensen, bóndi, latið eitt øki, sum liggur beint omanfyri, til tjøld á Summarfestivalinum. Tað gevur so pláss fyri okkurt um fimti tjøldum afturat.

Um veðrið ikki er til vildar at tjalda, so er ein summarsmátta eisini á tjaldøkinum, har fólk kunnu kroka, um tað skuldi verðið neyðugt. Hetta er sjálvandi bert til tey, ið tjalda.

## Nógv tjaldpláss umbiðin

Til Summarfestivalin í ár eru nú um fýrati tjaldpláss umbiðin, so tað sást ein vøkstur í hesum gistingarháttinum.

Sambært Norðoya Kunningarstovu eru plássini til húsvagnar, sum krevja el við at ganga undan nú, men tað er nógv pláss eftir at seta vagnarnar.

– Fólk hava verið heldur fyrr at bíleggja sær pláss á tjaldøkinum í ár í mun til í fjør. Tað var beinanvegin, tá tey størru nøvnini vórðu avdúkað, at fólk byrjaðu av álvara at ringja, sigur Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu.